MERKISDAGAR

90 ára føðingardagur
Hósdagin 18. juli verður Elisabeth Nystrøm Klaksvík 90 ár, vælkomst verður í Norðoya Kvinnufelag, Bøgøta 3, frá kl 17 .00 til 21.00

80 ára føðingardagur
12. juli fyllir Poula Højgaard Joensen, Runavík, 80 ár. Dagurin verður hildin 13. juli frá kl. 17 í Nón.

80 ára føðingardagur
Leygardagin 13. juli verður Erling Mýrá, Vági, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni í húsinum hjá Matmøðrafelagnum frá kl. 10 og úteftir.

80 ára føðingardagur
Mikudagin 17. juli fyllir Sigrid Jacobsen í Vági 80 ár. Dagurin verður hildin leygdardagin 13. juli frá 11 til 16 í Jómsborg. Øll er hjartaliga vælkomin.

80 ára føðingardagur
Hósdagin 11. juli Palle Lamhauge Vestmanna 80 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum í Vestmanna, sama dag frá kl 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

60 ára føðingardagur
Tann 22. juli fyllir Eyðun Vest Vágur 60 ár. Dagurin verður hildin 20. Juli í Billiardhúsinum frá kl 19 til 24. Tey, ið vilja gleða Eyðun, við at koma í føðingardag, vinarliga sigið frá innan 16. juli á tlf 586168, 573462 ella 278097.

50 ára føðingardagur
30. juli fyllur André Joensen, Vágur, 50 ár. Dagurin verður hildin í Billiardhúsinum 02. august kl 19. Tilmelding á tlf: 278397 og 269704. Seinasta freist at melda seg til er 25.juli.

Gullbrúdleyp
Leygardagin 27. juli hava hjúnini Marianna og Álvur Magnusson Klaksvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hátíðarhildin frá kl 15 00 í hølinum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag í Bøgøtu Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin
Marianna og Álvur

Gullbrúdleyp
Mánadagin 22. juli hava hjúnini Rakul og Niklas Foldbo gullbrúdleypsdag. Dagurin verður hildin fríggjardagin 26 juli í kirkjuhjallarinum í Fríðrikskirkjuni frá kl 18.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Brúdleyp
Jacobina og Martin Skorastein Haahr blivu vígd í Esbjerg tann 30/3-13. Í tí sambandi ynskja vit at bjóða familju og vinum til veitslu í LÍF-húsinum tann 20. juli frá kl. 17.00.

Brúdleyp
Leygardagin 20. juli giftast Tóra Øre Hansen og Niklas Sofus Norðgerð. Vígslan verður í Fríðrikskirkjuni kl 14.

Brúdleyp
Leygardagin tann 13. juli giftast í Fasterholt Kirke (DK), Turid Debes Poulsen dóttir Joan Poulsen og Paula Debes, og Eyðstein Andreasen sonur Rósu Andreasen og Victor Olsen. Brúðarparið býr Ejstrupvej 1, Fasterholt, DK-7330 Brande.

Brúdleyp
Leygardagin 13. juli kl. 14 giftast í býráðshúsinum í Klaksvík, Astrid Leivsgarð Jacobsen og Kristoffur Dragaberg, Klaksvík. Høvi verður at heilsa upp á brúðarparið í hølinum hjá kappróðrarfelaganum í Árnafirði frá kl. 17.
Síggjast :)

LÝSINGARTORGIÐ

Akfør

Gamal Volvo GLE
Frá 88, nýsýnaður, til sølu.
213303

Bilur til sølu.
Opel astra 1,6. Koyrt 102.000. Litur - blátt. Synadur 2011. Í gódun standi. Til sølu vegna skúlagongd.
281823

Arbeiði

SETHÚSATEKNINGAR NÝTAST IKKI AT VERA DÝRAR
TEKNINGAR TIL SETHÚS, BILHÚS, UMBYGGING OG TEKNINGAR TIL BYGGILOYVI.
ELISABETH MORTENSEN TLF,517244

MÁLA HÚS
MÁLA,PUSSA,URTAGARÐ V.M. MAZDA DEMIO BÍLIGA TIL SØLU. 3SETT AV DEKKUM Á FELGUM 13,14,15 TUMMA TIL SØLU
224910

Takarbeidi
Ynskir nakar at fáa tekjuna skifta í summar av húsasmidi vid nógvum royndum innan fagi. SMSA ella ring og fá eitt gott tilbod.
004540759886

Maskinmeistari
Søkt verður eftir maskinmeistara við vinnubrævið á 1 stigið til frystitrolara. Vit bjóða fasta frítíðarskipan og tryggjaða hýru. P/F Jókin
214362 og 775500

Býli í Føroyum

Íbúð í Tórshavn Nýggj íbúð í eysturbýnum til leigu frá 1-08-2013. 77 fermetrar. 2kømur. Gott útsýnið. Fult møbulera við øllum hentleikum. 7400 kr um mdr. alt íroknað.
590965

Íbúð í Tórshavn 80 m2 til leigu frá 1-08-2013. 4500. kr um mdr írokna hita.
263837

Ìbúð ynskist til leigu í Havn
Par við tveimum børnum ynskja at leiga íbúð í Havn. Má hava 2 ella 3 kømur og vera í góðum standi. Vit eru friðarlig, fara væl um og gjalda til tíðina
+298264339

Íbúð í Kaldbak
Íbúð til leigu frá 1/2 August, 75 m2 . 2 kømur, í góðum standi, 5250 kr um mánan við øllum, send mail til pnolsoe@yahoo.com ella ring Pauli
510339

íbúð ynskist
Vit eru tveir ungir menn, ið skulu í skúla í Havn í august, tí søkja vit um eina íbúð, má hava tvey kømur. Vinarliga ring
361932/252867

Góð íbúð í vesturbýðnum til leigu
Hevur 2 góð kømur -køk- stovu og bað. Felags vaskirúm. Leiga við hita og el kr:6,750 2 mdr. depos.
285455

Til leigu
Tvey kømur til leigu á Hoyvíksvegnum, við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu
211208

Býli uttanlands

3-rúms íbúð á Oyrasundskollegiinum
Til leigu frá 8. juli til 7. august. Íbúðin er í L-blokkinum á 7. hædd. 4 soviplàss og ein tremmisong. Allir hentleikar og tætt við Metro.
236048

Lekkur íbúð mitt í Keypmannahavn
Íbúð til leigu á Vesturbrúgv frá 15.juli-2.aug fyri 3500,- pr. viku. Gott buss og toksamband, beint við Fisketorvet. Íbúðin hevur 6 soviplàss.
0045 24260234

Leita eftir íbúð í Keypmannahavn
Vit eru tvey, ið fara niður at lesa í august og leita eftir íbúð at leiga ella framleiga í Keypmannahavn í nakrar mánaðir. Alt hevur áhuga.
507571

Íbúð til leigu í summar
64 m² íbúð í Kbh. NV til leigu í juli og august. 4 soviplàss. Gott buss- og tok samband. Kr. 2.500 pr. viku.
516010

Pløgg

Hosur til søluí
Myrkablåar og myrkamorreyðar hosur til føroyska mannfólkabúnan til sølu, 500 kr. parið. Eru maskinbundnar.
588666

Súkklur

Motorsúkla til sølu
Motorsúkla Suzuki RF 900 R 135 HK er frá 1996 og hevur koyrt 19164 km. Til sølu
tlf 211269

Ymiskt

Flytigóðs
Pláss er fyri flytigóðsi niður til Danmarkar tann 4. aug. og uppaftur uml. eina viku seinni.
749251 ella 449251

Starvslýsing

Trivnaðardepilin

Námsfrøðingar til Trivnaðardepilin – eind 5 í Suðuroy

Eind 5 í Trivnaðardepilnum er fyri børn, ung og vaksin fólk við menningartarni í Suðurstreymi og í Suðuroy. Talan er um 2 størv at seta 18. august 2013

- Eitt starv á 30 tímar um vikuna í Frítíðartilboðnum í Vági og at veita stuðul til ungan mann.
- Eitt starv á 25 tímar um vikuna í Frítíðartilboðnum í Vági.

Tey, ið verða sett, fáa møguleika at avloysa í eind 5 í Suðuroy, tá tørvur verður á avloysarum.

Arbeiðsuppgávur
Arbeiðið fevnir um at virka fyri, at fólkini mennast í einum tryggum, mennandi og skipaðum gerandisdegi.

Vit vænta at

- tú ert við til at leggja til rættis námsfrøðiliga og praktiska arbeiðið á arbeiðsplássinum
- tú ert fakliga, sálarliga og likamliga væl fyri
- tú hevur Kt-førleika á byrjunarstøði
- tú hevur koyrikort
- tú tolir broytingar bæði í mun til arbeiðsuppgávur og broyting, tá talan er um arbeiðsstað

Førleikakrøv
Umsøkjarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving. Um eingin søkir við útbúgving, kann starvið verða fyribilssett við hjálparfólki.

Setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið umfatar Almannaverkið og deildir undir tí.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Julionnu Næs Olsen, eindarleiðara á Trivnaðardeplinum á telefon 29 74 26.

Umsókn
Umsókn saman við CV , prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til starv@av.fo.

Til ber eisini at senda umsókn sum bræv til:

Almannaverkið
Trivnaðardepilin
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
110 Tórshavn

Vinaliga merkið brævbjálvan " umsókn Eind 5"

Umsóknarfreist: 23. juli 2013 kl. 12.00

Almannaverkið er Føroya Størsta arbeiðspláss við 1.700 starvsfólkum, sum árliga veita 14.000 borgarum eina tænastu ella eina fíggjarliga veiting. Almannaverkið umsitur 1,7 mia. árliga

almannaverkið

Smyrilsvegur 20 · Postsmoga 3096 · 110 Tórshavn · Tel 360000
Faks 360001 · av@av.fo · www.av.fo

www.av.fo

